Álit

í

løgtingsmáli nr. 75/2022: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Leingja gildistíðina á rættindum)

Beinir Johannsen, Árni Skaale, Bárður á Lakjuni, Jørgen Niclasen, Jacob Vestergaard og Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, tingmenn, hava lagt málið fram tann 7. mars 2023 og eftir 1. viðgerð tann 28. mars 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 31. mars, 19., 21. og 26. apríl 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Felagið Peningastovnar, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag og Dennis Holm, landsstýrismann í fiskivinnu- og samferðslumálum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Erhard Joensen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Meirilutin heldur, at gildistíðin á veiðirættindum hevur sera stóran týdning fyri vinnuna yvirhøvur. Serliga er gildistíðin avgerandi, tá feløg hava í umbúna at endurnýggja síni vinnutól. Føroyski fiskiflotin er sera ymiskt fyri, og tað er sostatt eisini ymiskt, hvussu fíggjarligu møguleikarnir fyri endurnýggjan av flotanum eru.

Meirilutin ásannar, at m.a. uppsjóvarflotin hevur seinnu árini haft møguleika fyri at endurnýggja seg við eini styttri avskrivingartíð enn 12 ár.
Heimaflotin hevur hinvegin ikki haft sama møguleika. Um vit taka línuflotan, so er hann seinnu árini endurnýggjaður nakað, ikki til nýggj skip, men til nýggjari skip.

Miðalaldurin á føroyska fiskiskipaflotanum er støðugt hækkandi. Sambært føroysku skipaskránni er miðalaldurin fyri fiskifør yvir 5 brutto tons hækkaður úr 30 árum í 2010 upp í 40 ár í 2022, sum er ein ræðandi gongd fyri eina tjóð, sum hevur fiskivinnu sum høvuðsvinnu.
Hetta, at føroyski fiskiflotin er eldur í miðal 10 ár seinastu 12 árini, boðar ikki frá góðum, og er eitt sjúkutekin, sum eigur at verða tikið í størsta álvara.

Ótryggleikin um hvørja skipan, fiskivinnan hevur havt at halda seg til, eftir at loyvini vórðu uppsøgd at fara úr gildi í 2007, metir meirilutin vera ein av høvuðsorsøkunum til íkomnu støðuna. Hetta, saman við vánaligum fiskiskapi hjá heimaflotanum seinnu árini, hevur gjørt støðuna enn verri.

Viðvíkjandi longdini á veiðirættindum hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum alment boðað frá, at ætlanin hjá landsstýrinum er at fremja broytingar. Hvørjar hesar broytingar eru, er enn óvist, men ein líknandi skipan, sum alivinnan er skipað eftir, hevur verið nevnd sum ein nærliggjandi møguleiki.

Meirilutin ásannar, at tá tað eru hugsjónarligir munir í politisku skipanini um, hvussu júst viðurskiftini við gildistíð skulu skipast, so er vandi fyri broytingum alt eftir, hvør situr við politiska valdið.

Fiskivinnan skal sjálvandi, sum aðrar vinnur, tola, at broytingar verða gjørdar, tá serlig viðurskifti gera seg galdandi. Hetta eigur tó ikki at verða vegna politiskt keglarí og órógv.

Meirilutin heldur tí, at gildistíðin upp á 12 ár ikki eigur at verða broytt, fyrr enn man hevur fingið greiðu á hvørja varðandi skipan, man vil seta ístaðin, og sum eigur at verða gjørd sum ein so breið politisk semja sum gjørligt.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið

Minnilutin (Annika Olsen, Uni Holm Johannesen og Karlot Hergeirson) tekur ikki undir við uppskotinum, vísandi til, at landsstýrismaðurin arbeiðir við at endurskoða skipanina við gildistíðini á veiðiloyvum og fiskiloyvum í bólki 5. Minnilutin ásannar, at so leingi tíðin gongur, og tað framvegis er óvissa um hesa skipan, kann tað hava ávísa ávirkan á framtíðarætlanirnar í vinnuni. Minnilutin heitir tí á landsstýrismannin um at arbeiða skjótt og koma við einum uppskoti í heyst.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið

Vinnunevndin, 28. apríl 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Karlot Hergeirsson	Árni Skaale	Jørgen Niclasen

Eyðdis Hartmann Niclasen